**Ítróttur**
e-mail: jakup@sosialurin.fo
Sosialurin - Box 76 - 110 Tórshavn - Tlf. 31 18 20 - Fax 31 47 20

**Lesið eisini ÍtróttaSosialin á alnetinum:**
**www.sosialurin.fo**

# Føroyingar til NM í ríðing

*Tríggir føroyingar fara 31. juli til Noregs, har teir skulu kappast við teir fremstu ríðararnar í Norðurlondum*

STEFAN Í SKORINI

Teir tríggir, sum skulu umboða Føroyar í NM, eru Poli Joensen, Jóanis í Hoygarðinum og Heri D. Dahl. Finn Danberg fer eisini við sum liðleiðari.

Tað er Føroyskt Íslandsrossafelag, sum hevur sent teir avstað. Tað varð longu avgjørt við FM fyri einum ári síðani, at tað skuldi verða teir tríggir, sum skuldu avstað. Tað er soleiðis skipað, at teir bestu frá FM luttaka í altjóða kappingum árið eftir, og felagið ger av, hvør skal avstað.

**Greinarnar**

Poli Joensen er tann, sum skal luttaka í flestu greinum. Hann verður við í fimmgongd, tølt, 250 metur skeið, 100 metur speedpass og steelpass. Poli er ikki heilt ókendur við slíkar kappingar, og hann hevur millum annað tvær ferðir verið við í HM, har hann hevur fingið heilt góð úrslit. Eisini hevur hann eisini verið í Íslandi og kappast. Poli fekk flest stig í teimum fimm kappingunum, sum hava verið í Føroyum í ár og gjørdist føroyameistari í fimmgongd og skeið.

Jóanis í Hoygarðinum og Heri D. Dahl skulu báðir kappast í fjórgongd og tølt. Jóanis gjørdist føroyameistari í hesum báðum greinunum um vikuskiftið. Heri D. Dahl fekk eisini heiðursmerki í hesum greinunum og gjørdist føroyameistari í travi. Annars gjørdi Jóanis nógv um seg í seinastu kappingini um vikuskiftið, har hann vann ikki færri enn seks heiðursmerki.

**Betri vónir hesuferð**

Heri var fyri tveimum árum síðani við í NM, meðan tað er fyrstu ferð hjá Jóanisi, at hann luttekur í eini altjóða kapping. Tað gekst tó ikki heilt eftir vild ta ferðina hjá Hera, men hesuferð hevur Heri góðar vónir um, at tað fer at gangast betri hjá føroyingunum.

Teir hava ikki síni egnu ross við, av tí at teir ikki fáa tey heimaftur til Føroya eftir kappingina, og Fiskimálastýrið gevur teimum ikki loyvi at selja rossini haryviri. Tí læna føroysku ríðararnir ross í Noregi, sum hava verið brúkt á norska landsliðnum. Hesi rossini skuldu verið betri enn teirra egnu, og tí eru møguleikarnir betri hesuferð, men leggjast skal afturat, at teir skulu kappast við sera góðar ríðarar á sera góðum rossum.

Dómararnir eru sera strangir í eini slíkari kapping, og teir leggja sera stóran dent á, at alt tað formella er í lagi. Annars verða luttakararnir kolldømdir. Sum dømi kann nevnast, at ein ríðari misti HM-heitið, av tí at vektin var 10 gram ov nógv.



*Fyst í juli mánaði skulu tríggir føroyingar til Noregs at royna seg NM við fremstu norðurlendsku reiðmenninar*

**Á venjingarlegu**

Fráferðin hjá teimum er tann 31. juli, men kappingin byrjar ikki fyrr enn 9. august. Teir dagarnar skulu ríðararnir brúka til at venja við teimum norsku rossunum, so at teir koma at kenna tey áðrenn kappingina.

6. august verður farið til Seljord, miðskeiðis millum Oslo og Bergen, har kappingin skal vera. Kappingin endar 13. august.

# Spennandi hondbóltsdystir á ólavsøku

*Tveir spennandi hondbóltsdystir vera í høllini á Hálsi á ólavsøku*

HEINI Í SKORINI

Tveir sera spennandi hondbóltsdystir vera á skránni á ólavsøku, og eru tað manslíðini hjá Kyndli og VÍF sum bresta saman, meðan hin dysturin er millum Neistin og StÍF.

Fyrri dysturin er gamli klassikarin í føroyskum hondbólti, Kyndil og VÍF, og er tað altíð ein spennandi og eisini ofta ein sera dramatiskur dystur. Hóast hesir dystir sum so ikki hava nakran týdning, so er æran altíð upp á spæl, og hesin dystur kann kanska eisini geva eina ábending um, hvussu hesir báðir arvafíggindarnir eru fyri í løtuni.Dómarar í dystinum verða Hjalmar Petersen og Kristian Johansen, og hava 3'arin og Skálkur úr SMS stuðlað við ávíkavist steypi og bólti.

Hin dysturin er eisini sera áhugaverdur, við tað at hetta eru føroyameistararnir frá í ár, Neistin, sum brestur saman við føroyameistararnar frá í fjør, STíF, og verður tað eisini spennandi at fylgja við tí dystinum.

Fyrri dysturin verður ólavsøkuaftan 28. juli kl. 19.30 í høllini á Hálsi, og verður tað dysturin millum Kyndil og VÍF, meðan STíF og Neistin spæla á sama staðið ólavsøkudag 29. juli kl. 18.00.

So til tykkum hondbóltsáhugaðu er heilt víst nakað at gleða seg til á ólavsøku.



*Klassikarin stendur á skránni ólavsøkuaftan, tá Kyndil og VÍF skulu royna seg*



# Seinasta umfarið

*Hóskvøldið verður seinasta umfarið í Grand Prix Føroyar kappingini, og súkklað verður í Havn. Kappast verður millum børn, unglingar og vaksin*

HEINI Í SKORINI

Hóskvøldið verður seinasta umfarið av Grand Prix Føroyar kappingini í Havn, har bæði børn, unglingar og vaksin fara at kappast. Børnini kappast í tveimum bólkum, og bólkarnir eru frá 5-9 ár, og frá 10-14 ár. Gentur og dreingir fara eisini at kappast hvør sær.

Hini árini hevur verið súkklað á teininum kring Havnarskrivstovuna, men í ár er teinurin broyttur, og súkklað verður tí á Skálatrøð, har børnini súkkla á teini kring parkeringsbásarnar. Unglingarnir og vaksin byrja við klædnahandilin Kallkyn, síðani gongur leiðin niðan eftir Grímkambansgøtu, oman eftir Sigmundargøtu, og so verður súkklað oman aftur á Skálatrøð. Unglingar og vaksin súkkla í 50 minuttir, síðani ringir ein klokka, og so verður farið út á seinasta umfarið.

Børnini byrja umleið kl. 19.30, og tað ber til at tilmelda seg frá kl. 18.00. Treytin fyri luttøku er, at allir luttakarar súkkla í hjálmi. Møguleiki er at læna hjálm frá Tórshavnar Súkklufelag.

Kappingin hjá teimum vaksnu byrjar umleið kl. 20.15, men tað er møguleiki hjá teimum sum luttaka í tí kappingini at hita upp á teininum, áðrenn kappingin byrjar, tí at teinurin verður stongdur frá kl. 18.30. Heiðursmerki vera latin til nr. 1, 2 og 3 í øllum bólkum. Luttakaratalið verður væntandi væl størri í ár enn hini árini, av tí at Statoil Kring Føroyar kappingin júst er liðug. Fleiri føroyskir súkklarar eru heima í løtuni, og nakrir av teimum útlendsku súkklarunum, ið luttóku í Statoil Kring Føroyar, vera eisini við. Tað varð ikki súkklað býarkoyring í Statoil kappingini, og hesir hava tí møguleika at vísa, hvat teir duga, nú tað stendur býarkoyring á skránni á ólavsøku.

Støðan hjá teimum vaksnu er í løtuni hon, at Gunnar Dahl-Olsen stendur til at vinna samanlagt. Kári Brattaberg er á øðrum plássi, og honum á baki er Sverri Mohr Edvinsson. Einasti súkklari, ið kann hótta Gunnar, er Kári Brattaberg. Gunnar hevur 148 stig, meðan Kári hevur 117 stig, so tað skal ganga sera illa hjá Gunnari, um hann ikki endar við gullheiðursmerkinum um hálsin, tá seinasta umfarið av Grand Prix Føroyar súkklakappingin er av.




# Ólavsøkan

*Bátarnir fara at liggja í hesi nummarrø› til kappró›urin 28. juli 2000*

**5 mannafør-dreingir**

| nr. | | kort |
|---|---|---|
| 1. | Blikur | |
| 2. | Royndin Fríða | |
| 3. | Junkarin | |
| 4. | Kollur | |
| 5. | Havfrúgvin | |
| 6. | Tjaldrið | |
| 7. | Spógvin | |
| 8. | Drekin | |
| 9. | Báran | |
| 10. | Sílið | |

**6 mannafør-kvinnur**

| nr. | | kort |
|---|---|---|
| 1. | Riddarin | |
| 2. | Páll Fangi | |
| 3. | Fuglfirðingur | |
| 4. | Hvessingur | |
| 5. | Jarnbardur | |
| 6. | Gongurólvur | |
| 7. | Lómur | 1 gult |
| 8. | Sólmundur | |

**5 mannafør-gentur**

| nr. | | kort |
|---|---|---|
| 1. | Dúgvan | |
| 2. | Spógvin | |
| 3. | Bylgjan | |
| 4. | Sílið | 1 gult |
| 5. | Drekin | 1 gult |
| 6. | Ørnin | 2 gul |
| 7. | Tjaldrið | |
| 8. | Frúgvin | 1 gult |
| 9. | Hvassi | 1 gult |
| 10. | Havfrúgvin | |
| 11. | Beinta | 1 gult |
| 12. | Súlan | |
| 13. | Blikur | |
| 14. | Royndin Fríða | |
| 15. | Junkarin | |

**6 mannafør-menn**

| nr. | | kort |
|---|---|---|
| 1. | Sólmundur | |
| 2. | Hósvíkingur | 1 gult |
| 3. | Gongurólvur | 1 gult |
| 4. | Strálan | 1 gult |
| 5. | Hvessingur | |
| 6. | Kollfirðingur | 1 gult |
| 7. | Snopprikkur | |

**8 mannafør**

| nr. | | kort |
|---|---|---|
| 1. | Knørrur | |
| 2. | Oyndri | |
| 3. | Miðvingur | |
| 4. | Heiðabáturin | |
| 5. | Húsavíkingur | |
| 6. | Toftabáturin | |
| 7. | Argjabáturin | |
| 8. | Gullbrandur | |
| 9. | Nevi Reyða | |
| 10. | Víkarbátur | |
| 11. | Ørvur | |
| 12. | Kvívíkingur | |

**10 mannafør**

| nr. | | kort |
|---|---|---|
| 1. | Vágbingur | |
| 2. | Havnabáturin | 1 gult |
| 3. | Nólsoyingur | |
| 4. | Vestmenningur | |
| 5. | Eysturoyingur | |
| 6. | Kjølur | |

Kappróðurin á ólavsøku byrjar kl. 14.30 við eykaróðrum, soleiðis at FM róðrarnir kunnu byrja kl. 15.00

Raðfylgjan sum róð verður í verður hendan:

1. Gomul 6 mannafør
2. 6-mannafør international
3. 8-mannafør oldboys
4. 4-mannafør dreingir FM
5. 6-mannafør kvinnur FM
6. 10-mannafør oldboys
7. 6-mannafør oldgirls
8. 5-mannafør gentir FM
9. 6-mannafør menn FM
10. 8-mannafør FM
11. 10-mannafør FM

# U-16 landsliðið í eldin

*31. juli fer norðurlandameistaraheitið í fótbólti fyri u-16 landslið í gongd í Gundadali í Havn*

HEINI Í SKORINI

30. juli koma sjey u-16 fótbóltslandslið til Føroya at kappast um norðurlandameistaraheitið í fótbólti, og er Føroyar við afturat hinum sjey landsliðunum. Hini liðini eru Ongland, Skotland, Ísland, Svøríki, Finland, Danmark og Noreg, har Føroyar skal leika móti Danmark, Onglandi og Finlandi, meðan Ísland, Svøríki, Skotland og Noreg skulu kappast í hinum bólkinum. Allir dystirnir vera leiktir á ovara og niðara vølli, meðan finalan verður leikt á Tórsvølli.

Hetta er ein sera stór avbjóðing hjá føroyska u-16 landsliðnum, sum spælir móti Danmark mánadagin 31. juli, Finlandi týsdagin 1. august, og Onglandi hósdagin 3 august. Fríggjadagin vera so dystir um sjeynda og áttanda pláss, fimta og sætta pláss, triðja og fjórða pláss, og so verður finalan klokka 17.00 á Tórsvølli. Hvønn dyst Føroyar fer at leika av hesum fýra dystunum fríggjadagin, má bert tíðin vísa.

| Ross | Eigari |
|---|---|
| Sólvindur 12 stig | Marita Pólsen, Havn |
| Lokkur 11 | Rólant Reinert, Havn |
| Stella 8 | Jógvan Arne Petersen, Sørvágur |
| Borga 5 | Berg Hestar, Havn |
| Alisa 4 | Æna Reinert, Havn |
| Svanna 2 | Hans Pauli Poulsen, Havn |
| Kambur 1 | Poul Falkvard, Havn |
| Sitting Bull 1 | Johan á Plógv, Havn |

Kappríðingin verður kl. 15 ólavsøkudag. Eftir kappríðingina verður ponyríðing, og okkurt verður at keypa til matna.

**Ólavsøkukappríðingin 2000**

**Trav**

| Nr | Ross | Aldur | Litur | Ríðari | Eigari | Heimstaður | Ólavs. 99 | ídag |
|---|---|---|---|---|---|---|---|---|
| 1 | Grani | 19 | Gulur | Henge Davidsen | Davidsen hestar | Miðvágur | | |
| 2 | Stigandi | 13 | Gráur | Heri Dahl | Kristian Debes | Tórshavn | 62,6 | |

**Tvíspor ung**

| Nr | Ross | Aldur | Litur | Ríðari | Eigari | Heimstaður | Ólavs. 99 | ídag |
|---|---|---|---|---|---|---|---|---|
| 3 | Sisu | 7 | Reyð | Randi Wardum | Sjálv | Tórshavn | | |
| 4 | Pippingur | 6 | Gulur | Ragnhild Rubeksen | Jógvan Frýdal | Velbastaður | | |
| 5 | Drós | 8 | Gul | Sigtór Lútzen | Sjálvur | Syðradalur | | |
| 6 | Brúsi | 4 | Gulur | Fríðolvur Múller | Edvard Múller | Kvívík | | |
| 7 | Kolfreyða | 13 | Reyðbrún | Sóleyð Johansen | Eddy Joensen | Kollafjørður | | |
| 8 | Maskot | 10 | Svartur | Øssur Andreasen | Davidsen Hestar | Miðvágur | 38,7 | |
| 9 | Litbrá | 13 | Brún | Barbara Carlsebn | Heðin Samuelsen | Tórshavn | 38,9 | |
| 10 | Vera | 8 | Svørt | Ella Joensen | Sjálv | Kollafjørður | | |
| 11 | Svanna | 12 | Flekkut | Djóni Poulsen | Hans P. Poulsen | Tórshavn | 36,9 | |

**Tvíspor II fl. vaksin**

| Nr | Ross | Aldur | Litur | Ríðari | Eigari | Heimstaður | Ólavs. 99 | ídag |
|---|---|---|---|---|---|---|---|---|
| 12 | Blesi | 9 | Reyður | Edvard Múller | Mortan Andreasen | Kvívík | | |
| 13 | Gula | 7 | Gul | Siri Davidsen | Davidsen Hestar | Miðvágur | | |
| 14 | Antaris | 16 | Flekkutur | Brynhild Nólsøe | Sjálv | Klaksvík | | |
| 15 | Tindur | 8 | Brúnur | Jóanes Poulsen | Hans P. Poulsen | Tórshavn | | |
| 16 | Vitnir | 6 | Gulur | Jonna Jensen | Ottar á Lofti | Sandavágur | | |
| 17 | Loðna | 7 | Brún | Kartin Hansen | Lutherus Hansen | Tórshavn | | |
| 18 | Alvin | 8 | Ljós br. | Kathrina Klakk | Sjálv | Klaksvík | | |
| 19 | Eldur | 10 | Gulur | Johnny Kjærbo | Sjálvur | Leynar | | |
| 20 | Hollur | 9 | Svartur | Gunnar Grækarisson | Sverri Trónd H. | Tórshavn | | |
| 21 | Jokul | 12 | Gulur | Dánjal P Múller | Jákup P Múller | Kvívík | | |
| 22 | Linsa | 12 | Brún | Henge Davidsen | Davidsen Hestar | Miðvágur | | |
| 23 | Garpur | 10 | Brúnur | Jákup W Joensen | Sjálvur | Kollafjørður | 36,7 | |
| 24 | Sitting Bull | 11 | Svartur | Svenning Reinert | Jóhan á Plógv | Tórshavn | 37,9 | |
| 25 | Ørvur | 7 | Gulur | Ólavur Johannesen | Martin Johannesen | Klaksvík | 42,1 | |

**Tvíspor I fl. vaksin**

| Nr | Ross | Aldur | Litur | Ríðari | Eigari | Heimstaður | Ólavs. 99 | ídag |
|---|---|---|---|---|---|---|---|---|
| 26 | Bjalli | 9 | Brúnur | Jens Ingolf Poulsen | Poul Einar Kruse | Tórshavn | | |
| 27 | Frosti | 9 | Gráur | Rakul Heygsá | Sjálv | Tórshavn | | |
| 28 | Gula | 6 | Gul | Súsanna í Búðini | Sjálv | Velbastaður | | |
| 29 | Garpur | 6 | Gulur | Birgir Hansen | Holgar Jacobsen | Sørvágur | 37,9 | |
| 30 | Stella | 9 | Gul | Torbjørn Poulsen | Jógvan A Petersen | Sørvágur | 34,9 | |
| 31 | Fenja | 9 | Gul | Hallur Hansen | Regin Hansen | Tórshavn | 35,1 | |
| 32 | Borga | 8 | Reyð | Durita H Sørensen | Berg Hestar | Tórshavn | 34,5 | |
| 33 | Aisa | 7 | Grá brún | Gunrid Hansen | Æna Reinert | Tórshavn | 35,9 | |
| 34 | Kambur | 7 | Gulur | Búi Holm | Pol Falkvard | Sørvágur | 34,6 | |
| 35 | Sólvindur | 6 | Gulur | Kristoffer Gaardlykke | Marita Poulsen | Tórshavn | 35,3 | |
| 36 | Fúsi | 10 | Gulur | Zacharias Jakobsen | Sjálvur | Leynar | 34,0 | |
| 37 | Lokkur | 9 | Brúnur | Kristfríð Jacobsen | Rólant Reinert | Tórshavn | 34,6 | |